


# Skapandi umhvørvi á Flat



*– Vit bera náttúruna og havið fram í tveimum stórum hornum. Hetta hevur verið ein mennandi verkætlan, ið vit avgjørt fara at gera aftur, sigur Jensa Højgaard Andreassen, leiðari á barnagarðinum á Flat*

**Í býlingshúsinum á Flat í Hoyvík hevur skapandi umhvørvi verið í hásæti seinasta mánaðin. Børnini í barnagarðinum hava havt læruríkar og stuttligar løtur í haganum og fjøruni.**

BØRN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Børnini í barnagarðsstovununum, Ritustovu og Lundastovu, í býlingshúsinum á Flat hava seinasta mánaðin sett fokus á náttúruna og havið. Um 40 børn hava arbeitt dúliga saman við starvsfólkunum á stovunu við tveimum verkætlanum. Tey hava teknað, málað, límað og klipt list í hópatali. Verkætlanin hevur síðan verið sýnd fram í barnagarðinum.

Seks ára gamla Malena heldur, tað hevur verið stuttligt at verið í barnagarði seinasta mánaðin:

– Eg havi málað hús og klipt tjøldur, ið eg havi hongt á eina grein. Tað hevur verið sera stuttligt – serliga at heinta steinar og goggur í fjøruni. Øll foreldrini hava eisini verið og hugt eftir framsýningini, og skjótt fara vit at hava ein 'pitsadag'.

Í Ritustovu hava tey arbeitt við eini verkætlan, ið kallast 'Náttúran og havið'. Hvønn dag seinasta mánaðin hava børnini arbeitt í smáum bólkum og verið í fjøruni og leitað eftir goggum, rekaviði, tara, steinum, fiskum o.ø.. Í haganum hava tey leitað eftir fuglum, mosa, lingi og grjóti:

– Vit hava málað steinar, ið vit síðan hava evnað til trøll og fiskar. Síðan hava vit stáplað eina bygd upp á beinini í einum horni, har vit hava sett náttúruna og havið saman. Hetta hevur verið ein mennandi verkætlan fyri bæði stór og smá, leggur Birita Weihe afturat.

## Lundastova og hagi

Í Lundastovu hava børnini serliga arbeitt við haganum:

– Fyrst gjørdu vit eitt fjall úr pappírsdeiggi. Eftir hetta fóru vit niðan í hagan at leita eftir ull og steinum. Síðan hava vit fortalt børnunum um harurnar, seyðirnir og fuglarnar, ið vit somuleiðis hava tilevnað úr pappíri og ull, vit funnu í haganum, sigur Jensa Højgaard Andreassen, leiðari í barnagarðinum.

Børnini í Lundastovu bert arbeitt við verkætlanini í eina viku, men tó sera intenst:

– Vit hava arbeitt í bólkum, og tað hevur verið sera hugnaligt og effektivt, leggur Jensa afturat.

## Lív og sál í arbeiðnum

Í barnagarðinum á Flat nýta tey dagliga náttúruna sera nógv – um summarið eru tey minst fýra ferðir um vikuna túrar í haganum, og tískil heldur Jensa Højgaard Andreassen, tað hevur stóran týdning, at børnini læra um náttúruna, og at tað eitt nú ikki er rætt at kasta burturkast í náttúruna:

– Endamálið við verkætlanunum hevur veirð at geva børnunum innlit í náttúruna og at læra tey at verna um hana. Tað hevur verið stuttligt at sæð børnini arbeitt so dúliga – tey hava veruliga lagt lív og sál í arbeiðið og hava glett seg at koma í barnagarð hvønn morgun, leggur Jensa Højgaard Andreassen at enda afturat.

Endabresturin av verkætlanini verður við einum 'pitsadegi' í komandi viku:

– Tá vit byrjaðu verkætlanina tóku vit eina mynd av hvørjum barni, ið foreldrini síðan keyptu frá børnunum, tá framsýningin lat upp. Pengarnir, ið komu inn, fara børnini í næstum at brúka til ein 'pitsadag' í komandi viku, sigur Birita Weihe, ið starvast í Ritustovu.